## Fleiri rentuhækkingar ávegis

Stjórin fyri europiska Miðbankan, Jean-Claude Trichet, sigur seg rokna við, at talan verður um fleiri rentuhækkingar enn hana, sum varð framd hósdagin.

- Búskaparligu útlitini í Europa gera tað sera sannlíkt, at talan verður um enn ein hækking í desember, men eftir tað rokni eg við, at rentan verður støðug, segði Trichet.

Tað hevur leingi verið roknað við, at rentan fór at hækka í tveimum umførum, og tí førdu útsagnirnar hjá Trichet ikki stórvegis broytingar á marknaðunum við sær.

## Dýrari olja

Seks av limalondunum í Nato komu um vikuskiftið ásamt um, at oljuframleiðslan í økinum verður skerd við 3,4%. Hetta fyri at steðga fallinum á oljuprísinum. Fyri einum mánaði síðani boðaði OPEC annars frá, at framleiðslan ikki skuldi skerjast, og tí høvdu tíðindini mánadagin alt fyri eitt ávirkan á oljuprísin. Amerikanska WTI vísitali boðaði mánamorgunin frá, at prísurin fyri tunnuna nú er $60,18. Brent, sum er uropiska vísitali, hevði ein prís á $60,40 fyri tunnuna.

# Kvikk er longdur og umbygdur fyri 7 miljónir krónur

**- Manningarumstøðurnar eru nú nógv betri og meira tíðarhóskandi, sigur reiðarin, Tórleif Sigurðsson, sum væntar, at skipið fer fyrsta túrin eftir umbyggingina longu í morgin**

NÚTÍMANSGERÐ

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Línuskipið Kvikk hjá Sp/f Kvikk í Klaksvík kom leygardagin aftur úr Hirtshals, har skipið er longt við 6,60 metrum. Kvikk er nú 35 metrar langur og er á stødd við hini línuskipini, sum frammanundan leingjanini vóru nakað størri.

Men Kvikk er ikki bara longdur. Skipið, sum nú liggur við bryggju í Klaksvík og sær út sum nýtt, er eisini umbygt. Tað er serliga apeteringin og arbeiðsumstøðurnar annars, sum eru betraðar munandi.

### Trivnaður umborð

- Vit fóru ikki undir hesa leingjan og umbygging, tí lastin var ov lítil. Kvikk lastaði 85 tons, sum undir vanligum umstøðum var nóg mikið.

Reiðarin, Tórleif Sigurðsson, sigur, at tað í fyrsta lagi eru manningarviðurskiftini, sum dentur hevur verið lagdur á at bøta um.

- Kvikk hevur bara havt 14 koyggjur, og nú eru tvey eitt-manskømur bygd aftrat. Manningin hevur fingið uppihaldsrúm, eins og umstøðurnar til goymslu og umklæðing eru nógv betri.

Tórleif sigur, at skipið eisini hevur fingið bakka, sum Kvikk ikki hevði áður.

- Dragilúkan er flutt longur aftur og er nú meira miðskips. Har frammi í bakborðssíðu er rúm bygt til proviant, og í stýriborðsíðu er rúm til reiðskap og annað. Manningin hevur fingið eitt deiligt uppihaldsrúm, sum skipið ikki hevði áður.

Reiðarin sigur, at átta mans búgva har frammi í skipinum, har gallan og messan eisini eru. Innanfyri uppihaldsrúmið er eitt rúm bygt til arbeiðsklæðini hjá manningini.

- Manningarrúmini har frammi eru sett í stand, og ein gongd er bygd í bakborðssíðu frá apeteringini har frammi og aftur í stýrhúsið.

Reiðarin sigur, at øll dúrkini, bæði í erva og í neðra í apeteringini, eru skift, og nýggjur belegningur er lagdur á.




*Kvikk er sum nýggjur á at líta, nú hann er komin aftur úr Hirtshals, longdur og umbygdur. – Vit halda, at vit hava fingið nógv fyri peningin, sigur reiðarin, Tórleif Sigurðsson*

*Mynd: Høgni Thomsen*

### Broytt arbeiðsdekk

- Alt arbeiðsdekkið er broytt. Skipið hevur fingið nýtt frystirúm til agnið, og kokkurin hevur fingið nýtt og egið frystirúm í erva til proviantin. Allir stokkar og splittarar til egningarmaskinuna eru skiftir, og tað eru báðir ljósmotorarnir umborð á Kvikki eisini.

Tórleif Sigurðsson sigur, at gamli stabiliseringstangin, sum stóð aftari í skipinum, var ikki góður. Hesin er tikin burtur, og ein nýggjur tangi er bygdur frammanfyri lastalúkuna, sum vísir seg at rigga væl.

### 7 mió krónur

- Samanlagt hevur leingjanin og umbyggingin av Kvikki kostað einar 7 mió krónur, og vit halda okkum hava fingið nógv fyri peningin, sigur reiðarin.

Kvikk er fyrrverandi Saturn III. Skipið er bygt í Strandby í Danmark í 1987.

Sp/f Kvikk í Klaksvík yvirtók skipið 1. januar 2004.

### Fakta um Kvikk

| | |
|---|---|
| Fyrrverandi navn: | Saturn III |
| Smíðistaður/ ár: | Strandby, DK (1987) |
| Longd: | 35 metrar |
| Breidd: | 7,50 metrar |
| BRT: | 163,73 |
| Maskina: | Calesen Diesel (1987) |
| Maskina/ stødd: | 575 HK |
| Eigari: | Sp/f Kvikk |

# Hanus Hansen byggja saltfiskavirki í Klaksvík

VIRKISÆTLAN

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hanus Hansen, stjóri í JFK-Troli, hevur søkt Klaksvíkar kommunu um loyvi til bygging av einum saltfiskavirki norðanvert Kósina og Landingarmiðstøð Føroya í Klaksvík.

Sum Sosialurin hevur skilt, er umsóknin gingin á møti í býráðnum í Klaksvík.

Tað er stutt síðan, at Hanus Hansen seldi Kósavirkið burtur úr JFK-samtakinum.

Kósavirkið hevði eitt vánaligt ár í 2005 við umleið einari miljón í undirskoti um mánaðin.

Teir, sum stóðu aftanfyri Kósavirkið, søgdu, at tað serliga var saltfiskurin, sum hevði gingið illa í hond.

Men nú er so líkt til, at Hanus Hansen aftur trýr upp á saltfiskaframleiðslu.



*Hanus Hansen trýr aftur upp á saltfiskaframleiðslu og ætlar nú at byggja eitt nýtt saltfiskavirki norðanvert Kósina*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*